# Útjaðarin eigur bestu ungdómsleikararnar

**Um vikuskiftið vóru Føroyameistararnir í yngru deildunum kosnir og tiltakið prógvaði, at tað ikki er av tilvild, at TB, SÍ og ÍF klára seg væl í eldru deildunum. Útjaðarin fór nevniliga við flestu meistaraheitunum**

FLOGBÓLTUR
*Sveinur Tróndarson*

Seinastu FM-kappingarnar í flogbólti vórðu avgreiddar um vikuskiftið. Hetta hendi tá skipað var fyri stórari FM kapping í Tórshavn fyri tær yngru deildirnar.

Sum ikki einaferð var undirtøkan sera stór. Ikki færri enn 95 lið høvdu boðað frá luttøku og tað vil siga, at gott og væl 600 ungir flogbóltsleikarar hava stríðst innanhýsis um, hvør teirra skuldi hava møguleikan at kalla seg Føroyameistara tað næsta árið.

Av tí at undirtøkan til kappingina var so stór, var neyðugt at leggja kappingina í næstan allar skúlarnar í Havn, og samstundis var eisini neyðugt at brúka allar tríggjar dagarnar í vikuskiftinum, fyri at klára at avgreiða alt samalt. Hetta gekk tó upp á stás og sunnukvøldið vóru allir meistararnir kosnir.

Samanumtikið kann sigast, at kappingin eydnaðist sera væl. FM-kappingin um vikuskiftið var bara ein av fleiri kappingum, sum samanlagt geva FM-heitið tá árið er farið. Skipanin er soleiðis sett saman, at liðini fáa stig fyri avrikið í teimum ymsu kappingunum, alt eftir, hvar tey enda og tað liðið sum hevur flest stig, tá árið er av, er Føroyameistari.

Eingin skipan uttan onkra ónøgd og soleiðis er eisini við hesari. Høvuðsorsøkin er tann, at onkur lið, vegna veður, ikki eru sloppin til onkra kapping, og tí hava tey einki stig fingið í onkrari kapping, og tí er skilligt, at onkur er ónøgdur.

Sum skilst verður tó skotið upp at halda fram við verandi skipan næsta kappingarár. FBF heldur eftir øllum at døma, at henda skipanin er tann frægasta sum finst, men heldur tó, at tað hevði verið vert at gjørt ta broyting, at tey bæði fremstu liðini í hvørjum aldursbólki, spældu eina finalu eftir at seinasta kappingin var farin aftur um.

## Útjaðarin fremstur

Annars kann staðfestast, at kappingin í Havn var ein stórsigur fyri útjaðaran. Ikki ber longur til at siga, at TB og SÍ eru smá feløg, tí í fleiri ár hava tey verið millum tey fremstu feløgini hvat ungdóminum viðvíkur, og í ár hava tey eisini staðfest seg millum fremstu liðini í vaksnamannaflogbólti.

Úrslitini hjá hesum báðum feløgunum – og hjá ÍF, sum vann tvey meistaraheitir – er eitt greitt tekin um, at flogbólturin hevur fingið fastatøkur á fólki kring alt landið.

Kappingin vísir eisini, at flogbólturin – um rætt verður atborið – hevur gott í væntu, men hon staðfestir eisini, at tað verður neyðugt at geva teimum ungu leikarunum tær avbjóðingar teimum tørvar, fyri at halda fast í teimum sum flogbóltsleikarar.

Bæði TB, SÍ, ÍF og KÍF hava í fleiri ár megnað at hála alsamt fleiri ungar leikarar til, og stuttligt er at síggja, at eitt lið sum SÍ, sum annars er serliga kent fyri mans- og dreingjaflogbólt, er farið at gera so nógv um seg í gentuflogbólti. Uttan at vita, hvussu kvinnuflogbóltur í Vágum verður skipaður í framtíðini, loyva vit okkum tó at staðfesta, at verður rætt atborið, sær framtíðin hjá vágagentunum sera spennandi út.

Tað sama má sigast um unglingarnar hjá ÍF og genturnar hjá TB. Fleiri av unglingunum hjá ÍF hava longu í ár verið partur av meistaradeildarliðnum hjá felagnum, og sjálvt um tað ikki altíð var so tespiligt í byrjanini av kappingarárinum, hava dystirnir í bestu deildini hjá monnum skapað leikararnar til meira heilar leikarar. Tí eigur framtíðin hjá at verða nøkunlunda tryggjað, tá hugsað verður um, at onkur av teimum eldru leikarunum, sum vóru við í ár, kanska ikki vera tøkir næsta ár.

## Miðvíst ungdómsarbeiði

Úrslitini hjá hesum trimum feløgunum er partur av miðvísum ungdómsarbeiði. Hjá TB er hetta bara enn eitt prógv um, at stríðið undanfarin ár hevur borið ávøkst, og hesi trý meistaraheitini gera bara kappingarárið til eitt enn betri kappingarár.

Seinastu nógvu árini hevur TB verið undangongufelag tá hugsað verður um yngru deildirnar og meistaraheitini, sum eru endað sunnanfjørðs eru ikki so fá. Avrikið hjá besta liði felagsins í kvinnudeildini vísir eisini, at arbeiðið als ikki hevur verið til fánýtis og tí eigur tað - saman við úrslitunum hjá SÍ - at eggja øðrum at fara undir tað sama.

Samstundis sum vit at enda ynskja teimum tíggju meistaraliðunum hjartaliga tillukku við FM-heitunum kunnu vit nevna trý tey fremstu liðini í bestu deildunum:

**Gentur 10:**
Nøvan, Fleyr og KÍF.
**Gentur 12:**
TB, Dráttur og KÍF.
**Gentur 14:**
TB, KÍF og Mjølnir.
**Gentur 16:**
SÍ, TB og Dráttur.
**Kvinnuunglingar:**
SÍ, TB og KÍF.
**Dreingir 10:**
Fleyr, TB og SÍ.
**Dreingir 12:**
TB, ÍF og SÍ.
**Dreingir 14:**
ÍF, Fleyr og SÍ.
**Dreingir 16:**
SÍ, Fleyr og TB.
**Mansunlingar:**
ÍF, SÍ og Fleyr.



*Dreingir 12 ár*



*Gentir 14 ár*



*Gentur 12 ár*



Dart:

# Endaliga støðan í liðkappingini



*Nakrir fegnir heiðursmerkjavinnarar í 1. deild, nú kappingarárið er av*



*Havnar Dartfelag vann eisini kappingina í 2. deild frammanfyri Havnar Róðrarfelag*

**Endaumfarið í liðkappingini í dart varð spælt í B36-húsinum síðsta vikuskifti.**

## 2. deild

Í 2. deild lá Havnar Róðrarfelag 4 best fyri at vinna gull. Undan síðsta umfarinum vóru teir 4 stig framman fyri Havnar Dartfelag 2. Men Havnar Róðrarfelag 4 megnaði bert at vinna tveir dystir í síðsta umfarinum, meðan Havnar Dartgelag 2 vann allar fimm. Tískil streyk Havnar Dartfelag 2 avstað gullinum framman fyri nøsini á trimum sera skuffaðum ungum monnum á liðnum hjá Havnar Róðrarfelag 4. Og tað var líka við at Havnar Róðrarfelag 4 eisini spældi av við silvuri, tí teir endaðu púra javnir við Havnar Róðrarfelag 2, sum tó mátti taka til takka við bronsu orsakað av innanhýsis úrslitum.

Endaliga støðan í 2. deild gjørdist henda:

| Nr. | Felag | Settmunur | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Dartfelag 2 | 96-39 | 24 |
| 2 | Havnar Róðrarfelag 4 | 84-51 | 22 |
| 3 | Havnar Róðrarfelag 2 | 84-51 | 22 |
| 4 | Balslev 2 | 57-78 | 12 |
| 5 | Havnar Róðrarfelag 3 | 48-87 | 6 |
| 6 | Pílar 2 | 36-99 | 4 |

## 1. deild

Í 1. deild dysturin stóð um FM-heitið millum Havnar Dartfelag og Argja Dartfelag.

Kravið til Argja Dartfelag var, at teir vunnu allar sínar dystir og at teir so fingu hjálp frá onkrum øðrum liðið, ið kundi taka stig frá Havnar Dartfelag. Argja Dartfelag greiddi sín part av setninginum, og spenningurin var øgiligur, tá Havnar Róðrarfelag í síðsta dystinum gav Havnar Dartfelag harða mótstøðu. Havnar Róðrarfelag kom á odda 4-2 og hevði góðar møguleikar at vinna fimta dystin eisini og harvið tryggja Argja Dartfelag FM-heitið. Men leikararnir hjá Havnar Dartfelag hildu høvdu kalt og javnaðu til 4-4. Tískil varð upp til Alvin Egholm (HR) og Jens Petur Poulsen (HDF) at avgera, hvar FM-heitið endaði. Báðir eru teir garvaðir leikarar, ið áður hava verið FM-vinnarar bæði fyri lið og einstaklingar; men tað var skjótt greitt, at tað stóð nógv á teimum. Havnar Róðrarfelag hevði tryggja sær bronsuna og tískil hevði Alvin ikki so nógv at spæla fyri, men hann var tó harðari raktur av nervum og megnaði ikki at sláa til í avgerandi løtunum, so Jens Petur vann dystin og harvið endurvann Havnar Dartfelag FM-heitið.

Strálan lá til bronsuna undan síðsta umfarinum, men eitt heldur óvæntað tap móti Vága Dartfelag kostaði teimum bronsuna. Pílar var eisini var við í kappingini um bronsuna undan síðsta umfarinum, men teir vóru ikki fullmannaðir henda dagin og tað kostaði teimum 6 ósigrar. Annars gjørdist endaliga støðan í 1. deild henda:

| Nr. | Felag | Settmunur | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Dartfelag | 116- 46 | 32 |
| 2 | Argja Dartfelag | 111- 51 | 32 |
| 3 | Havnar Róðrarfelag | 94- 68 | 20 |
| 4 | Strálan | 82- 80 | 18 |
| 5 | Pílar | 67- 95 | 12 |
| 6 | Klaksvíkar Dartfelag | 65- 97 | 8 |
| 7 | Vága Dartfelag | 32-130 | 4 |



*Havnar Dartfelag vann tepurt kappingina í 1. deild frammanfyri Argja Dartfelag*



12. mai kl. 15.00 í Ítrottarparkini

FCK - Brøndby

Úr Føroyum 9. mai kl. 20.40
Aftur til Føroya 13. mai kl. 08.55

Prísur: kr. 1.995,-
við í prísinum er atgongumerki, rundtúr við Toda í Parkini og ferðaavgjald.
Avmarkað nøgd.

ROCKSHOW 2002
EYEQ, DEN GALE POSE, TV2
COWGIRLS, SAYBIA
FCK og RockShow skipa fyri konsert í Fælledparken í Keypmannahavn11. mai.
Les meira á www.fck.dk

Sosialurin
í samstarvi við Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo